# Ábyrgdin takast frá læknum og stjórum

**HEILSUVERKIÐ** Nú má Løgtingið taka spurningin um føroyska heilsuverkið til viðgerðar og gera læknum og sjúkrahúsleiðslum greitt, hvørjar viðgerðir og hvønn heilivág, vit skulu bjóða sjúklingum

Áki Bertholdsen

» **Tað er ikki vist, at tað er røktarfakliga stjóranum, tað er galið við**

- Hetta kann ikki halda fram!

Jenis av Rana, tingmaður fyri Miðflokkin og lækni, sigur, at nú má tað vera greitt fyri øllum, at munandi broytingar mugu henda í føroyska heilsuverkinum.

- Hesi seinastu árini eru einir fýra stjórar á Landssjúkrahúsinum varpaðir til hús tí at tað er so tórført at halda játtanirnar. Men tað hevur ikki hjálpt og tí má tað nú verða øllum greitt, at trupulleikarnir verða ikki loystir við at koyra stjóran til hús.

- Men hesi seinastu árini er støðan nógv batnað, so at koyra Allan Skaalum frá nú, loysir slett ongan trupulleika. Tann avgerðin mann mest verða tikin fyri at landsstýrismaðurin kann vísa á, at hann hevur gjørt okkurt.

### Velja viðgerðir til og frá

Eisini Jenis av Rana er ein av teimum politikarum, sum nú er sinnaður at taka viðurskiftini í heilsuverkinum.

- Tað, sum nú krevst, er, at Løgtingið tekur eitt kjak um hvat vit vilja við okkara heilsuverki.

- Vit í Løgtinginum mugu nú taka eina avgerð um, hvørjar viðgerðir vit vilja veita sjúklingunum í føroyska heilsuverkinum og hvør heilivágur skal vera til taks. - Samstundis skulu vit so eisini gera greitt, hvørjar viðgerðir og hvønn heilivág, vit ikki skulu bjóða.

- Vit mugu taka støðu til um vit skulu bjóða sjúklingum tann besta heilivágin, sama hvat hann kostar. Vit mugu eisini taka støðu til, um vit skulu hava viðgerðartrygd og hvussu langir bíðilistar í mesta lagi kunnu vera.

- Sostatt vita bæði læknar og sjúkrahúsleiðslur, hvør tann politiski viljin er á økinum og kunnu arbeiða har eftir. Samstundis skal politiski mydugleikin eisini gera sær greitt, at hann má betala fyri tær tænastur, hann krevur av heilsuverkinum.

Jenis av Rana sigur, at tað politisku støðuna hava vit ongantíð tikið í Føroyum.

- Men hon má takast, serliga fyri at taka eina órímiliga ábyrgd frá starvsfólkinum í heilsuverkinum.

Tað fer at gera tað munari lættari hjá starvsfólki í heilsuverkinum at arbeiða, tí so vita tey alla tíðina, hvør kósin er. Og politikararnir mugu so eisini gera sær greitt, at skulu vit hava eitt heilsuverk á hædd við hini norðanlondini, krevur tað figging.

- Ella vit kunnu velja viðgerðir og heilivág frá og siga, at í Føroyum skal tænastan verða á lægri støði fyri at spara pening.

- Men velja vit ikki eina viðgerð frá, ber heldur ikki til at siga einum stjóra upp, sum bjóðar hana fram.

Hann sigur, at tekur ongin annar stig til at reisa tað málið í Løgtinginum, fer hann at gera tað sjálvur og kanska fer hann at byrja við einum fyrispurningi.

*aki@sosialurin.fo*

» **Tað skal vera ein einsamallur stjóri á Landssjúkrahúsinum**

# LANDSSJÚ… SKAL END…



**KOLLVELTING** Støðan á Landssjúkrahúsinum verður nú tikin upp í Løgtinginum, tí hetta er rætta løtan komin til at fremja kollveltandi broytingar, heldur Miðflokkurin

Áki Bertholdsen

- Nú er rætta løtan komin at fremja umfatandi broytingar á Landssjúkrahúsinum.

Tað halda løgtingsmenninir Jenis av Rana og Bill Justinussen, úr Miðflokkinum.

Teir vilja nú hava Løgtingið at at taka støðuna á Landssjúkrahúsinum til viðgerðar og endamálið við teirri viðgerðini skal vera at fremja umfatandi broytingar í virkseminum og í arbeiðsgongdini.

Akkurát hvussu teir báðir fara at reisa málið í Løgtinginum, hava teir ikki tikið støðu til.

Men Bill Justinussen er vísur í landsstýrismaðurin í heilsumálum, Aksel V. Johannesen, fer at fáa meiri enn ein spurning í Løgtinginum um støðuna á Landssjúkrahúsinum og tað er eisini væntandi, at onkur beinleiðis uppskot fara at verða løgd fyri tingið.

### Leiðslan skerjast

Og stendur tað til Miðflokkin, skulu viðurskiftini á Landssjúkrahúsinum kollveltast.

Serliga heldur Bill Justinussen, at leiðsluviðurskiftini eina at verða munandi broytt.

» **Tað er ikki nokk at koyra stjóran**